**Ungdómspolitikkur:**

# Frítíðarmiðdepil í Hoyvík og ungdómshús í Kollafjørði

LEVI MØRK
valevni til býráðsvalið fyri Javnaðarflokkin



Ja, nú stundar ímóti byráðsvali og eg bjóði meg fram á Javnaðarlistanum hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, sum valevni 11. novembur 2008.

Her havi eg eitt stórt hjartamál, sum eg arbeiða fyri, um eg verði valdur og tað er, at tað verður bygdur ein nýggjur frítíðarmiðdepil í Hoyvík og í nýtt ungdómshús í Kollafjørði.

Út frá fólkatalinum í Hoyvík og í Kollafjørði, er grundarlag fyri at byggja nýggj ungdómshús bæði í Hoyvík og í Kollafjørði. Tað er heilt vist, at tørvur er á einum slíkum staði bæði í Hoyvík og í Kollafjørði. Td. kan nevnast at í Vestmanna og á Tvøroyri er ungdómsklubbar.

Sambært heildarætlanini fyri Tórshavnar kommunu kann roknast við, at eini 6.000 fólk fara at búgva í Hoyvík/Hoyvíkshaganum í 2022. Eg havi ikki nøkur tøl fyri Kollafjørð.

Mín hugsan er, at børn frá 3. til 5. flokk kunnu vera inni í frítíðarmiðdeplinum frá kl. 15.00-til 17.00 og tey størru børnini/ungdómurin kunnu vera í frítíðarmiðdeplinum frá kl. 17.00 til 22.00.

Men til viðurskiftuni verða betri og nýggjur frítíðarmiðdeplin verður bygdur, ber til at leiga seg inn í kirkjukjallaran hjá Hoyvíkar kirkju og brúka frítíðarskúlan í Hoyvík til endamálið.

Tað eru fleiri møguleikar, fyri at fáa hetta ígjøgnum, m.a. kann núverandi frítíðarskúli í Hoyvík, brúkast til endamálið.

Eisini eru møguleikar fyri, at leiga seg inn í Hoyvíkar Kirkju, um kirkjuráðið gongur við til tess. Her hevur frítíðarskúli í Hoyvík havt eitt sera gott samstarv við Hoyvíkar Kirkju tað farna árið og tann leigusáttmálin sum Tórshavnar kommuna hevur við Hoyvíkar Kirkju, átti at hildið fram við atliti til, at 3 og 5 floks børn kunna nýta hetta tilboði við at vera í kirkjukjallaranum, sum er klokkulárur til endamálið.

Í longdini er besta loysnin at byggja ein nýggjan frítíðarmiðdepil í Hoyvík. Eg haldi at hann kann byggjast á Karlamagnusarbreyt.

Tórshavnar Kommuna hevur gjørt eina heildarætlan fyri Karlamagnusarbrey í Hoyvík og á heimasíðuni, www.torshavn.fo, stendur at lesa:

**Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt**

Sambært heildarætlanini fyri Tórshavnar kommunu kann roknast við, at uml. 6.000 fólk fara at búgva í Hoyvík/Hoyvíkshaganum í 2022. Í dag er nógv tann størsti parturin av bústaðum í sethúsum við lutfalsliga stórum grundøki. Í framtíðini er ætlanin at byggja fleiri raðhús og íbúðarhús. Í heildarætlanini fyri Tórshavnar kommunu er avgjørt at lutfallið millum hesi bústaðarsløg, skal verða: -sethús 40%-íbúðarhús 20%-raðhús 40%.

Hetta er partvís fyri at spara byggilendið, men eisini fyri at fáa eitt størri fjølbroytni í bústaðarhópin.

Í heildarætlanini verður býarpartsdeplar eisini umrødd. Mett verður at ein býarpartsdepil krevur eitt íbúgvaraupland uppá uml. 5.000 fólk.

Funktiónirnar, ið eiga at verða í einum býarpartsdepli eru t.d. skúli, stovnar, skrivstovur, tænastuvirkir sum t.d handlar, mat- og skeinkistøð v.m.

Endurgeving endað.

Sum tit síggja í heildarætlanin er nógv gott nevnt omanfyri, her er jú eisini skúlar og stovnar.

Tí haldi eg at hetta er tað besta staðið at byggja ein nýggjan frítíðarmiðdepil, sum eisini kann virka sum eitt mentanarhús í Hoyvík. Eisini tí, at heildarætlanin er longu gjørd fyri økið Karlamagnusarbreyt.

Hetta er og verður til stóra gleði fyri allar borgarar í Hoyvík og í Tórshavnar Kommunu sum heild.

Í Kollafjørði tørvar eisini ein slíkan frítíðarmiðdepil ella ungdómshús, sum kann taka børn og ung inn eftir skúlatíð. Ungdómurin í Kollafjørði, hevur ov langa leið til Havnar eitt nú til Margarinfabrikkina og tað er ikki nóg gott.

Ungdómurin í Kollafjørði, heldur til rundan um nýggja skúlan og ítróttarhøllina eftir skúlatíð. Tað er ikki í lagi, tey skullu hava eitt stað at fara til og tað skal vera undir skipaðun námsfrøðiligum viðurskiftum.

Tað eru fleiri øki í Kollafjørði har eitt slíkt ungdómshús kann byggjast, m.a. beint við nýggju Ítróttarhøllini og skúlan.

**Fíggjarstøðan:**

Fíggjarliga sær gott út hjá Tórshavnar Kommunu, so eg síggi ikki nakran truppuleika við tí.

Sjálvandi skulu vit vera ansin fíggjarliga, tí alt kostar pening, men tað eru eisini møguleikar fyri inntøkum innan hetta økið, td. ber til at leiga ein frítíðarmiðdepil út til ymisa mentan o.a.

Vit tosa ikki um eina íløgu samaborið við nýggja skúlan á Argjum, har tað er skilabest at fíggja nýggja skúla við einum langtíðarláni – soleiðist at tað eru rokningar til komandi ættarli og komandi íløgur.

Eg vil heilt vist arbeiða við hesum málinum, um eg verið valdur inn í Tórshavnar býráð.

Sami truppuleiki verður eisini á Argjum um nøkur ár og ikki at gloyma á Velbastað, har hevur ungdomurin ov langa leið til Havnar, til td. Margarinfabrikkina.

Eitt annað sum eisini hugtekur meg, tað er, at vit fáa eitt ungdómsráð hjá Tórshavnar Kommunu. Vit hava eitt eldraráð, hví ikki fáa eitt ungdómsráð, har ungdómurin í kommununi sjálvur kann vísa á hvat ið tørvurin er.

**Ungdómur undur 18 ár gloymdur:**

Ungdómurin undir 18 ár manglar eisini eitt stað at fara í vikuskiftinum, tí tey eru ov ung til at koma inn í klubbar og annað. Her má eisini gerast nakað og eg kundi ynskt, at tey eisini fingu sítt egna stað við skipaðum viðurskiftum, har tey sjálvi seta dám á tørvin og føla at hetta er teirra stað.

Tað hjálpir ikki, at leiga seg inn onkrastaðið og uttan nakar hevur eftirlit við teimun. Nej tey skulu sjálvi hava eitt stað við námsfrøðiligum eftirliti, men tey skulu hava kenslu av, at hetta er teirra stað.

Um vit fyribyrgja á økinum, kann alt gott koma burtuúr. Vit kenna øll tað negativu síðuna tí tað er skjótt at koma út í óføri o.a. um tú ikki verður hoyrdur og virdur sum persónur, eisini tá ið tú ert undur 18 ár.

**Børn við serligum tørvi:**

Eisini vil eg arbeiða fyri, at børn við serligum tørvi fáa betri sømdir, sjálvt um hetta økið er meira eitt landsmál enn eitt kommunumál. Børn við serligum tørvi hava alt ov ring kor í tí føroyska samfelagnum. Hetta lýkist ongum. T.d. eru eingi serlig tilboð fyri børn við serligum tørvi eftir 2. flokk, tvs. her er eingi frítíðartilbo sum dekka tørv teirra.

Hetta er eisini, ein trupulleiki, tí her er talan um eitt mál sum er landsmál og ikki kommunalt. Eg kenni frá mínu dagliga yrki sum leiðari fyri frítíðarskúlan í Hoyvík, fleiri dømi um hetta, har tað verður kladrast um fíggjarlig viðurskiftu og hvør hevur ábyrgdina.

Men vit sum búgva í Tórshavnar Kommunu, eru jú øll borgarar í Tórshavnar Kommunu, eisini serbørnini. Tí má nakað gerast fyri at flyta nøkur mørk og bøta um viðurskiftini hjá okkara serbørnum.

Eg farið í øllum førum, at gera mítt til, at alt hetta verður sett í verk.

Vel Levi Mørk til býrásvalið 2008. Eg eri á Javnaðarlistanum, listi C

# Ábøtur átrokandi í samband við ættleiðing

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Ættleiðingarfelagið hevur leingi strongt á politiska myndugleikan, at hækka stuðulin til ættleiðing. Fleiri uppskot um hetta mál eru og vera í løtuni viðgjørd á tingi.

Kostnaðurin – tá ættleitt verður - er 150.000 kr og í fleiri førum gerst kostnaðurin meir enn 200.000 kr sigur ættleiðingafelagið á frálíku heimasíðu síni. Tá er mist arbeiðsinntøka, vaksinatiónir og so framvegis íroknað. Alsamt fleiri ynskja at ættleiða og bíðitiðin er ofta 4 ár.

Umframt at stuðla teimum familjunum sum ættleiða eru samfelagsligi fyrimunirnir og ágóðin eisini stórur, tá fólk ættleiða.

**Samfelagsligi ágóðin**

Fólkatalið stendur í stað í Føroyum. Millum annað tí at korini hjá barnafamiljum ikki eru nóg góð. Tað visti m.a. kjakið í Miðlahúsinum, tá kanningin um útisetar í Danmark hjá norðuratlantsbólkinum herfyri bleiv løgd fram.

At ein familja skal rinda 200.000 kr fyri eitt barn er órímiligt. Hjá teim flestu er neyðugt at spara upp ella taka lán til tess at fáa ráð til at ættleiða eitt barn. Er tað rímiligt, at summi skulu lána hópin av peningi til tess at gerast foreldur og vera við til at hækka fólkatalið í Føroyum? Og skal møguleikin at ættleiða bert vera ein rættur hjá teim vælbjargaðu? Sjálvsagt, má tað ikki vera pengapungurin sum avger um fólk sleppa at ættleiða ella ikki. Pengapungurin avger ikki foreldraevni og foreldraførleikar annars.

Fleiri og fleiri hava alsamt tørv á fertilitetsviðgerð. Samfelagsliga ein góð íløga at játta hesar viðgerðir. Men talan er um eina krevjandi tíð og viðgerð hjá teimum sum skulu ígjøgnum hana. Um vit stuðla ættleiðing í størri mun kann kanska hugsast, at enn fleiri velja ættleiðing heldur fyrr. Spurningurin er eisini, um vit ikki áttu at síðusett fertilitetsviðgerð og ættleiðing á tann hátt, at ættleiðingarforeldur fingu væl størri stuðul.

Herfyri var ein framúr ráðstevna sum MBF skipaði fyri í samband við, at ST sáttmálin um vernd og rættindi teirra brekaðu var settur í gildi. Nógvir áhugaverdir fyrilestrar vóru á degnum. Ein teirra helt Niels Egelund, professari. Hann greiddi frá, hví alsamt fleiri børn við serligum tørvi vóru í skúlunum. Ein orsøk var, at summastaðni vóru hjún so tætt í familju, at øktur vandi var fyri ymsum sjúkum og brekum. Hetta gjørdi seg serliga galdandi í smærri samfeløgum. Vit vita eisini, at so er her í Føroyum. So tað er bara gott, um føroyingar alsamt gerast fleir og koma úr ymsum ættum.

**Barsilsskipanin, tá ættleitt verður**

Øll fegnast um, um at barsilsskipanin batnaði munandi, meðan Tjóðveldi varaði av vinnumálum. Tíverri vóru fleirtalið av politikarunum enn ikki búnir til at síggja fyrimunirnir í einari pápakvotu, men tað verður vónandi skjótt. Tað er tó at harmast um, at tey sum ættleiða ikki hava fingið heilt somu rættindi sum onnur við broyttu barsilsskipanini. Mismunurin er, at tey, ið eru støk fáa rættindini hjá hinum foreldrinum, og harvið eitt longri farloyvistíðarskeið. Løgtingið valdi tó ikki at lata hesa serskipan fyri støk vera galdandi fyri tey sum ættleiða - hetta hóast støk kunnu ættleiða.

Eisini kunnu foreldur velja, at pápin bert tekur tvær vikur saman við mammuni og mamman fær tvær vikur eyka. Heldur ikki tann broytingin er galdandi fyri tey sum ættleiða.

Herfyri var eg saman við hjúnum sum høvdu ættleitt ein fittan drong. Skilti á teimum, at umráðandi var, at ættleidda barnið bert bleiv hildið og klemmað av mammuni og pápanum og ikki øllum øðrum at byrja við. Hetta, tí at barnið skuldi læra, hvørji mamman og pápin vóru. Fleiri av ættleiddu børnunum hava búð á barnaheimi í mánaðir og ár. Tískil hava tey ikki lært, at mamman og pápin eru primeru umsorgannarpersónarnnir í lívi teirra. Hugsi tí, at vert er at umhugsa at leingja barnsburðarfarloyvið hjá teimum sum ættleiða.

**Ærin og lombini**

Í Føroyskum politikki er tíverri mangan so, at heldur enn at fremja skilagóðar avgerðir og raðfestingar, er mest umráðandi, at politikarin sjálvur fær æruna av einum uppskoti. Sera harmiligt at so er, tí mangan verða somu uppskot viðgjørd umaftur og umaftur, men verða ikki samtykt fyrr enn talan er um eitt samgonguuppskot.

Søgan í hesum máli er, at Ættleiðingarfelagið strongdi á landsstýrismannin um fáa hækka stuðulin í samband við ættleiðing. Uppskotið bleiv sent til hoyringar og stóð á løgtlistanum hjá CHE-samgonguni á ólavsøku. Annika Olsen valdi kortini at leggja uppskotið fram í august, men tók tað aftur, tá hon gjørdist landsstýriskvinna. Tjóðveldi og sjálvstýrisflokkurin hildu tá, at eingin orsøk var til at taka eitt skilagott uppskot sum longu var framlagt aftur. Vit vildu tí hava tað framlagt aftur.

Um tað verður hetta uppskotið – sum fólkaflokkurin hevur gjørt - ella eitt komandi uppskot sum verandi samgonga fer at leggja fram, vita vit ikki í skrivandi løtu. Men givið er, at annað uppskotið verður samtykt og tað kunnu øll fegnast um. Í undanfarnu samgongu - CHE samgonguni - vóru vit so mikið at okkum komin, at vit tóku undir við fleiri andstøðuuppskotum, eisini góvu vit andstøðuni møguleika fyri at leggja uppskot fram, eftir lokna freist. Óvanligt og óhoyrt í føroyskum politikki – men eftir okkara tykki ein gongd leið, sum vit vóna kann geva sitandi samgongu íblástur.

**Samstarv gongur báðar vegir**

Velji at trúgva, at øll 33 á Føroya løgtingi í roynd og veru vilja samstarv og framburð. Men trupult er at skapa eina nýggja arbeiðsmentan. Eingin ivi er um, at vit røkka fleiri málum til frama fyri land og fólk um vit geva hvørjum øðrum rúm og møguleikan fyri at ávirka – tað sama um fólk er í andstøðu ella samgongu. Slíkt arbeiðsumhvørvi og arbeiðsmentan hevði givið enn fleiri skilagóðum føroyingum áhuga fyri politikki sum heild. Ímyndi mær eisini at sjálv mannagongdin frá eitt mál bleiv framlagt til tað bleiv endaliga samtykt ella fall hevði verið nógv meiri kveikjandi og framtakshuga, um øll høvdu møguleika fyri at seta síni fingramerki á ymsu lógaruppskotini. Samgongan ynskir samstarv – tað eri eg „við uppá“..... men samstarv gongur sum kunnugt báðar vegir.